## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av landnyrðingi, seinnapartin lækkar hann niður í landsynning. Sólglottar, men eisini okkurt ælið, partvís kavi. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitin millum frostmarkið og +3 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin strúkur í vindi av útsynningi, sunnudagin upp í hvassan vind av útnyrðingi. Vátakavaella kavaælingur og hitalagið millum –1 og +3 stig.

# Tónleikaguðstænasta í Havnar Kirkju

**Í vikuni fyri páskir verður ein serstøk guðstænasta í Havnar Kirkju**

GUDSTÆNASTA



Tað er kórið Cantabile, sum saman við Gudmund Mortensen, organisti, og Ann Dahl Hansen, presti, fer at halda guðstænastu við kórsangi, tónleiki, felagssálmum og lestrum.

Skráin er sett saman soleiðis, at tónleikur og lestrar hóska til hvønn dag í páskavikuni: Pálmasunnudag, skírisdag, langafríggjadag, 1. og 2. páskadag.

- Kórið syngur kórsatsir við orðum úr Bíbliunnar Sálmum og úr okkara egnu sálmabók. Nakrir av hesum satsum eru skrivaðir av danska organistinum Merete Kuhlmann, sum við einfaldum tónalag og urgufylgisspæli dugir væl at fáa innihaldið og tónan í teim einstøku páskadøgunum fram. Sum til eina vanliga guðstænastu eru eisini sálmar, sum alt kirkjuliðið syngur saman við kóri og urgu, siga fyrireikararnir.

Ann Dahl Hansen fer at lesa stuttar lestrar, sum eisini hóska til dagarnar í páskavikuni.

Guðstænastan er hugsað sum ein fyrireiking til páskahátíðina, har vit við orðum og tónum uppliva páskavikuna við øllum tí kensluborna, sum har gongur fyri seg, í einari heild.

- Vónandi kann hon eisini vera ein íblástur til í sjálvari páskavikuni at fara í kirkju og hoyra um teir einstøku páskadagarar hvør sær.

Guðstænastan verður í Havnar Kirkju týsdagin 31. mars kl. 20. Leiðari av kórinum Cantabile er Unn Paturson.

## LUFTTRÝSTIÐ







**Í gjár:**
Ein hátrýstryggur, 1012 hPa. yvir Føroyum fer í landsynning. Eitt lágtrýst, 992 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landsynning eystan, suður um Føroyar.

**Í dag:**
Lágtrýstið í landsynning úr Føroyar fer í landsynning. Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -13 |
| Nuuk | -3 |
| Qaqortoq | -2 |
| Ammassalik | -1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 13 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 5 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 9 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 15 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 11 |
| Malta | 11 |
| Tunis | 12 |
| Beijing | 10 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | -- |
| New York | 11 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | -- |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 26 |

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 22/03 kl. 06[00] – 23/03 06[00]. Hitin í gjár: 4,2°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 9,0 mm – mált frá 22/03 kl. 06[00] – 23/03 06[00].
Avfallið higartil í mars: 98 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

18. mars — Seinna kvarter
19. mars — Mánin longst frá jørðini
26. mars — Tendring

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 24. mars | 04:54 | 17:13 | 03:54 | 16:13 | 04:09 | 16:28 | 06:54 | 19:13 | 07:54 | 20:13 | 03:09 | 15:28 | 02:09 | 14:28 | 05:09 | 17:28 | 06:09 | 18:28 | 04:39 | 16:58 | 05:54 | 18:13 |
| 25. mars | 05:31 | 17:50 | 04:31 | 16:50 | 04:46 | 17:05 | 07:31 | 19:50 | 08:31 | 20:50 | 03:46 | 16:05 | 02:46 | 15:05 | 05:46 | 18:05 | 06:46 | 19:05 | 05:16 | 17:35 | 06:31 | 18:50 |
| 26. mars | 06:09 | 18:29 | 05:09 | 17:29 | 05:24 | 17:44 | 08:09 | 20:29 | 09:09 | 21:29 | 04:24 | 16:44 | 03:24 | 15:44 | 06:24 | 18:44 | 07:24 | 19:44 | 05:54 | 18:14 | 07:09 | 19:29 |
| 27. mars | 06:49 | 19:09 | 05:49 | 18:09 | 06:04 | 18:24 | 08:49 | 21:09 | 09:49 | 22:09 | 05:04 | 17:24 | 04:04 | 16:24 | 07:04 | 19:24 | 08:04 | 20:24 | 06:34 | 18:54 | 07:49 | 20:09 |
| 28. mars | 07:31 | 19:54 | 06:31 | 18:54 | 06:46 | 19:09 | 09:31 | 21:54 | 10:31 | 22:54 | 05:46 | 18:09 | 04:46 | 17:09 | 07:46 | 20:09 | 08:46 | 21:09 | 07:16 | 19:39 | 08:31 | 20:54 |




javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo